## Regina C




27. november: Regina C er á veg til Nuuk at landa við fullari last. Teir skullu vera har til landingartíð í morgin árla. Polar Amaroq kom inn í morgun at landa. Teir hava fulla last inni. Teir byrjaðu túr uppí á 72 stig, men endadu úti í Buginum, sum er nakað her útfyri. 28 november: Í dag er stilli og – 4,5 stig. Polar Amaroq var liðugur at landa kl 0330 í nátt. Teir sigldu kl gott kl 0400.

*Grønlandstíðindi frá Kára við Stein*

## Veiða væl uppi við 72. breiddarstig

29. november: Í dag – 9 stig stilli. Lómur kom inn at landa í morgun. Teir hava 90 tons inni, men teir sleppa ikki út aftur fyri leygardagin at royna. Hetta eru ordrar frá skriviborðsskiparunum á virkinum. Annars havi eg frætt, at einir tveir trolarar eru upp í á 72 stigun og veiðan er í lagi. 3 desember: Í dag er – 8 stig og stilli. Natarnaq kom inn at landa í morgun, og Qaqqatsiaq kom inn til Nuuk í morgun at landa. At enda sendir Kári eina heilsan til mostur sína Hilmu, sum fyllir 90 ár 7. desember.

*Grønlandstíðindi frá Kára við Stein*

# Væl á veg til amerikanskar tilstandir




*Jákup Jensen, stjóri í Intrum Føroyar, ávarar móti keyp nú – rinda seinni tilboðunum eins og móti kredittkortunum, sum nú eru komin á føroyska marknaðin*

**Amerikanski »keyp nú – rinda seinni«-lívsstílurin er av álvara við at koma inn á okkum. Hetta er ein óheppin gongd, heldur Jákup Jensen, stjóri í innheintingarfyritøkuni Intrum Føroyar**

GJALDSINDEX
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Vit verða undirdýkt í tilboðum. Og gjaldstreytirnar gerast lagaligari og lagaligari. Men vandi er í hvørjari vælferð, heldur Jákup Jensen, stjóri í innheintingarfyritøkuni Intrum Føroyar.

- Gjaldsindexkanningin, sum vit gjørdu í vár vísir, at føroyingar eru raskastir at »gloyma« at rinda rokningar í Norðanlondum. Og tað verður neyvan betri, nú handlar og fyritøkur yvirbjóða hvønn annan við »keyp nú – rinda seinni«-tilboðum, sigur Jákup Jensen.

Kanningin vísti, at føroyingar altso liggja í tunga endanum av Norðanlondunum, har Finland er væl fremst, tá tað ræður um at gjalda sínar rokningar til tíðina. Hetta hongur partvís saman við, at finnlendingar eru ógvuliga autoritetstrúgvir, men lógin heimilar eisini handlum og fyritøkum at leggja høga rentu og ómaksgjald á, um ikki verður goldið til tíðina.

Eisini Svøríki liggur væl í hesi kanninginum, men verður hugt at londunum sunnan fyri, eitt nú Portugal, so er skilið har út av lagi, og nógv verri enn hjá føroyingum.

Men øll verða freistað av lokkandi tilboðum. Eitt nú ber til í Danmark hjá ungum at taka lán um fartelefonina, og hóast hetta tilboð ikki er í Føroyum enn, so eru so mong onnur tilboð, eisini vend at teimum ungu.

### Vandi við kredittkorti

Samstundis sum stóru bankarnir bjóða viðskiftafólki kredittkort, bjóða handlar kundum sínum keyp nú – rinda seinni-tilboð. Og hetta er ein vandamikil gongd, heldur Jákup Jensen.

- Serliga tá tað røður um kredittkort er vandi á ferð. So væl fyri handil sum fyri kunda. Tað ganga nevniliga 28 dagar frá tí tú rindar við kredittkortinum til handilin fær pengarnar, og tað sigur seg sjálvt, at er talan um eina framman undan veika fyritøku í likviditeti, kunnu tær koma sær í óføri, sigur Jákup Jensen.

Hann vísir víðari á, at talan er um eina ógvuliga høga rentu á kredittkortum, heili 14%. So eisini hjá brúkaranum er vandi á ferð.

- Hetta keypsmynstri er nakað, sum fer at vinda upp á seg. Tað er lætt at fáa fatur á kreditti, bæði frá bankum og handlum. Men handlar og fyritøkur mugu ansa sær, tí við kredittkortunum geva tær jú meiri kreditt enn tær høvdu ætlað, vísir Jákup Jensen á.

### Broyta hugburð

Stjórin í Intrum Føroyar sigur, at Ongland er tað landið, sum hevur tikið mest við amerikanska lívsstílinum, og har hevur stjórnin ásanna, at okkurt má gerast, so unga ættarliðið ikki fer heilt í hundarnar av ovurkeypi.

- Enska stjórnin hevur gjørt av, at børn í 11-16 ára aldri skulu hava nýggja lærugrein, sum nevnist »economic well-being and financial capability« (búskaparlig vælferð og fíggjarligur førleiki). Endamálið er at læra tey ungu at taka fíggjarliga ábyrgd eftir at tey eru farin úr skúlanum, og orsøkin er vandin fyri, at eitt ungt ættarlið setur seg í botnleysa skuld beint eftir lokna útbúgving, sigur Jákup Jensen.

Og at tað er ein trupulleiki við útistandandi peningi sæst best av, at tað í Europa í dag eru 250 milliardir evrur, ella 1850 milliardir krónur, útistandandi. Og í